# Næmingar venda aftur sum lærarar

**Frá mánadegnum 27. mars hava 9. flokkarnir í Eysturskúlanum verið í starvsvenjing. Vit hava verið ein túr í Hoyvíkar skúla og prátað við tríggjar næmingar, ið eru í starvsvenjing har**

PRAKTIKANTAR
*Rannvá Næs Guttesen / Lilja Holm Mortensen*

Fríggjamorgunin fór leiðin niðan í Hoyvíkarskúla, har tey trý Silja Joensen, Súsanna Ottosen og Grímur Høgnason Mohr eru í starvsvenjing. Tey valdu júst hetta plássið, tí at tey øll hava verið næmingar har í sjey ár, og tey hildu, at tað kundi verið sera stuttligt at roynt at verið lærari.

Í skúlanum undirvísa tey í hvør sínum 3. flokki. Tey undirvísa næmingunum í øllum lærugreinunum, men hesa fyrru vikuna hevur tað verið evnisvika, so tann fagliga undirvísingin er ikki byrjað fyrr enn í dag. Í triðja flokki var evnið Teiland. Hetta dámdi børnunum sera væl, og í 3. a gongur ein genta, ið er úr Teilandi.

Eftir evnisvikuna hevur verið vanlig skúlagongd.



*Súsanna, Silja og Grímur byrja tíman við einari fyrisøgn*

*Mynd: Rannvá Guttesen*

### At vera lærari

Tað hevur verið rættiliga stuttligt. Tey halda øll, at tað er betri at vera lærari, tí tá hevur ein valdið, men tey siga eisini, at tað er strævi, tí tá ein er lærari, tá noyðist ein at vera fyrireikaður til allar tímarnar. Tó er tað eisini gott at vera næmingur, tí tá kann man lættari slappa av.

Sum við øllum øðrum, eru tað summi ting, ið eru betri, og onnur ting, ið eru verri við bæði at vera næmingur og lærari.

Øll starvsfólkini eru sera fitt og blíð, og eisini eru tey sera dugnalig. Eftir tímarnir eru lærarirnir sum vanlig menniskju. Tey halda øll trý, at tað er sera løgi og ørðvísi at uppliva lærararnar frá hesari síðuni.

Næmingarnir eru sera fittir og blíðir, í flestum førum. Eftir sum, at Silja, Súsanna og Grímur eru í hvør sínum flokki, og av tí grund ikki hava somu næmingar, hava tey hvør sína áskoðan um næmingarnar. Silja heldur, at genturnar eru sera friðaligar og fittar, men dreingirnir eru sera óargaligir, men tó fittir. Grímur hevur eina meiri javna áskoðan. Hann heldur, at øll eru bæði fitt og óargalig. Súsanna fortaldi okkum, at hennara flokkur var ótrúliga góður, næmingarnir kundu ikki veri friðarligari.

Næmingarnir eru friðarligir, dugnaligir og so akta teir eisini væl, sum heild eru tað tríggir sera góðir og fittir flokkar.

### Serlig hending

Higartil hava ikki so nógvar serligar hendingar verið, men í samband við evnisvikuna skuldi allur skúlin læra at dansa linjudans yviri í Hoyvíkshøllini. Hetta hildu tey vera eina sera spennandi og stuttliga hending.

### Framtíðarætlanir

Silja er vís í, at tað at vera lærari ikki er hennara framtíðarstarv, tí hon ætlar sær aðrar vegir. Tó sigur hon, at tað er sera stuttligt at vera lærari, og henni dámar væl at arbeiða við børnum.

Súsanna hevði væl tímað at verið lærari, tí at henni dámar sera væl at vera saman við børnum og at vera í eini undirvísingarstovu, og hon vil fegin geva øðrum eitt sindur av sínari vitan.

Grímur veit enn ikki, hvat hann ætlar sær í framtíðini, men sum hann sjálvur sigur, hvør veit, kanska verður hann lærari.

Tey eru øll trý samd um, at Hoyvíkarskúli er eitt sera gott starvsvenjupláss, og eingin av teimum hevði viljað verið á einum øðrum plássi.

Tey eggja eisini øðrum, ið skulu í starvsvenjing at fara í Hoyvíkarskúla, um ein dámar væl at undirvísa og at vera saman við børnum.

### At fáa næmingar niðan

Vit hava eisini havt eitt prát við Birgit Arge, ið er skúlastjóri í Hoyvíkarskúla. Hon heldur, at tað er sera stuttligt at næmingar koma niðan. Um tað eru nakrir av okkara fyrrverandi næmingum, ella um teir eru úr øðrum skúlum, tað er altíð líka stuttligt. Millum annað hevur onkur verið úr Klaksvík, men tey flestu eru øll úr Havn.

Praktikkantarnir arbeiða júst sum allir lærarirnir her uppi. Teir eru við til alt tað, ið fer fram. Vit fortelja teimum eisini, hvussu tað er at arbeiða sum lærari, og tað at vera lærari er so nógv annað enn at undirvísa.

Stutt sagt heldur hon, at tað er sera stuttligt at hava næmingar í starvsvenjing hjá teimum. Praktikkantar eru altíð vælkomnir niðan, og vit eru altíð glað fyri at hava teir her.

Lærarin Maibritt S. Egholm, ið m. a. er lærari tí flokki, sum Súsanna er í, sigur, at Súsanna er ein stór hjálp, og hon vísir nógva ábyrgd. Hon er góð við børnini, og teimum dáma hana heilt væl.

Í komandi viku fer hon at fáa fleiri uppgávur, tí at vit halda, at hon er sera dugnalig.

Súsanna kundi heilt víst blivi lærari í framtíðini, sigur Maibritt.

## Spurningar til børnini

**Vit hava spurt nakrir næmingar, ið teir tríggir praktikkantarnir hava.**



*Kristina, ið gongur í 3.d sigur: Silja er ordiliga fitt og stuttlig. Hon dugir væl at læra*




*Niklas, ið gongur í 3.b sigur: Grímur er mega fittur og ordiliga stuttligur. Eisini dugir hann væl at læra*



*Sudarat, ið gongur í 3.a: Súsanna er stuttlig, fitt og góður lærari. Hon er eisini altíð so smørt*





*Anna og Rannvá, ið ganga í 3. a siga: Vit halda, at Súsanna er ordiliga fitt, mega cool og dugir væl at læra. Heldur ikki hevur hon givið okkum nakað heimaarbeiði, so hon er best*